**Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,**
**FR-100 Tórshavn.Tlf.316973. Fax 318516. fsn@fsn.fo www.fsn.fo**

Tórshavn tann 03-04-2018

Hey góðu limir í Føroya Skipara- & Navigatørfelag.

Nevndin í FSN hevur umrøtt á nevndarfundi, um at royna hendan háttin, at kunna limir felagsins um virksemið felagsins fyri ca. hvørt kvartal.
Vit høvdu eina síðu í blaðnum Mið og Magn ” Dagbókin” hetta verður soleiðis ca. tað.

**Sáttmálasamráðingar**
Tað eru nógvar samráðingar fyri framman, men vit eru settir í bíðirøð. Eg kann t.d. nevna samráðingar við tað almenna viðv. SSL – Magnus Heinason – Havnafútar/umsjónarfólk og V&B. Men hetta er ein støða, sum vit ikki fáa framskundað, men mugu vísa tolsemi. Tað hava verið ymisikar røddir, um hvørt vit skulu góðtaka ein kr. sats, sum Starvsmannafelagið (SF) og Lønardeildin (LND) eru komin til. FSN hevur skrivliga boðað frá, at vit góðtaka ikki, at SF leggur lønarkarmin fyri okkum, tað megna vit sjálvi at gera og eitt arbeiðspláss á landi, kann ikki líknast við eitt arbeiðspláss á sjónum.

**Fiskivinnan**
FSN hevur samtykt, at leingja avtaluna millum FSN og Føroya Reiðarafelag ”fiskiskip” (FR), til at kunna fara úr gildi 1. apríl tó fyrstu ferð 1. apr 2019. Hetta grundað á, at vónleyst er at samráðast um nakað, vit ikki vita nóg mikið um.

Tað er eingin loyna, at nógv politiskt rumbul hevur verið og er í hesi samgongu, so hvussur verður og ikki viðv. fiskivinnunýskipan og ikki, tað vita vit sum sagt alt og lítið um, men vit vóna sjálvsagt, at karmarnir verða tryggir fyri okkara limir og arbeiðsgevaran. FSN hevur sum sagt havt nógv hoyringssskriv um fiskivinnunýskipanina og vit kunnu bara vóna, at okkurt kemur við av okkara viðmerkingum.

**Handilsvinnan**
Tað hava verið ymiskar rembingar viðv dekkarum umborð á handilsskipum. Tað er nú einaferð soleiðis, at krøvini eru herd viðv. manning umborð á skipum og minst umborð á handilsskipum, so eitt ella annað stað, so mugu vit góðtaka tað, tí hetta eru international krøv og skipini sigla í Internationalum farti. T.d. er í dag ikki nokk at verða 14 ár og verða fermdur, sum tað var fyrr. Nú skalt tú, sum minsta mark hava nógva siglingstíð ca. 30 mánaðir, síðan skal tú hava ½ ára skúla.
Stóri trupulleikin hjá okkum føroyingum er, at vit hava ikki nokk at **fult tiknum** dekkarum, so ymisku reiðaríini hava tørv á, at finna manning aðrastaðni uttanfyri Føroyar.
Føroya Fiskimannafelag vísir á, at eingin sáttmáli enn tann føroyski er galdandi fyri dekkarnar og tað er partvíst rætt, men trupulleikin er tann, at tá vit virka Internationalt, so muga vit so ella so virða Internationalar reglugerðir. Tit vita nokk fullvæl, at Føroyar eru **FOC** skrásett ” h**entleikaflagg ”.** Hetta er eitt sindur tekniskt, hvussu tað verður roknað út, men fyri at siga tað heilt stutt, so kemur tað an uppá, hvussu stórur partur av ”Tonaguni”, sum er undir FAS, veruliga

er Føroyskur, also, er veruligi eigaraskapurin í Føroyum. Fer tann parturin minni enn eitt ávíst %, ja so eru vit at meta við eitt **FOC** land. Eg kann upplýsa tykkum um, at útlendsku dekkarnir fáa føroyska sáttmála løn, og eg havi sjálvur sæð avtaluna. So hetta er ikki ein trupulleiki, kanska meiri ein illvilji, ella politiskt spæl av FF, tí teir dáma ikki FAS skipanina.
Vit manningarfeløgini hava ein felagsskap, sum nevnist ”Faroes Maritime Union (FMU), har formenninir eru nevndarlimir. Hesin felagsskapur hevur egnar viðtøkur, har tað millum annað stendur. ”At *FMU skal virka fyri, at FAS verður ein dygdargóð skipan og FMU skal gera sáttmálar fyri útlendska manning umborð á FAS skráseettum skipum og tryggja teimum* ***hóskandi*** *lønar- og sáttmálaviðurskifti”.*

Eg vil kunna tykkum um, at tað eru fleiri sáttmálar á økinum t.d. **ITF standar uniform.** Hesin er fyri FOC skrásett lond og sum eru góðkendir runt allan heimin **NIS** uniform. Ikki skrásett á FOC. Hesin er fyri Norsk Internationalt skrásett skip **men** um FF gekk við til ITF standard, so var trupulleikin loystur, men nú standa vit til at missa ein stóran part av hesum skipum úr FAS og møguliga missa fleiri av okkara limum arbeiði har umborð og í øllum føri missa vit teir limirnar, so støðan er katastrofal, einki minni enn tað.

**Samlagstryggingin við LÍV**
Vit hava saman við Maskinmeistarafelagnum gjørt eina nýggja 5 ára avtalu um samlagstrygging ”Hættusligar sjúkur” t.d. við deyða tryggingartakara kr. 800.000,- maki kr. 400.000,- Hættusligar sjúkur fyri tryggingartakara kr. 150.000,- og børn undir 18 ár eisini kr. 150.000,- so eitt ískoyti til hoyriapparat max kr. 8.000,- hetta síðsta er nýtt og gjaldið er farið niður frá kr. 350,- pr./ md. til kr. 300,- pr./md.

**Sakarmá/limamál**
Tað eru onkur limamál, men sum aloftast klára vit tey uttan rættargongd og eg vóni, at vit kunna koma undan tí háttinum at loysa trætur uppá.

**Bakkafrost**
FSN hevur havt fund við leiðsluna á Bakkafrost. Hetta er tí, at alivinnan er vorðin ein so stórur og týðandi partur av føroyska samfelagnum í dag, so har er eitt potensiali fyri limaskapi. FSN hevur verið á fundi við mest sum allar navigatørarnar hjá Bakkafrost, men ikki ” Smáu alibátarnar”, um limaskap og hetta sær rættuliga gott út.

**Grótbátar J & K Petersen**
Hetta er eisini ein, sum so nýggj vinna og her eru fleiri nýggir limir komnir afturat.

**Maritimur kunningardagur**
FSN og MF hava tosað saman um at fyrireika ein maritiman dag fyri sjófólk. Ætlanin við hesum degi er, at seta fokus á ymisku altjóða broytingarnar í heiminum í dag. Eisini er ætlanin at fáa FMA, Hans Johannes á Brúgv at greiða frá, hvussu skipanin við persónsprofili á heimasíðuni hjá FMA riggar. Eisini verður greitt frá, tá søkt verður um vinnubrøv av ymiskum slag endurnýggja/uppstiga o.s.v. Tað er eisini ætlan at hava eina App á Smart Phone, har ein kann hava øll síni loyvisbrøv/vinnunbrøv á.
Dagurin verður hildin á Vinnuháskúlanum og ætlanin er at halda dagin 24. mail kl 09:00. Byrjað

verður við kaffi og morgumbreyði. Á døgurða verður FISH & Chips.
Høvi verður sjálvandi at seta spurningar og mingulera.
Tiltakið verður sjálvandi GRATIS ☺

**Kunning um frítíðarløn**
Um ein siglir sum **stýrimaður við fiskiskipi**, so fer frítíðarlønin á frítíðarlønar kontu hjá Føroya Fiskimannafelag og teirra frítíðarár er frá 1. apríl til 31. mars.

Um ein siglir sum **skipari við fiskiskipi**, so fer frítíðarlønin á kontu hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag og tað frítíðarárið er frá 1. januar til 31. desember (álmanakkaárið).

Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai.

**At enda**
Hetta er so ein byrjan til eina kunning um, hvat hendir í okkara gerandisdegi. Havið tað gott har úti og eru tað spurningar, so eru tit vælkomnir at skriva ella ringja og sjálvandi eru tit eisini vælkomnir at støkka inn á gólvið  og kaffi er í kannuni…

Vegna Føroya Skipara- & Navigatørfelag
Annfinnur Garðalíð
Formaður

.